## Heimsins størsta KT-stevna er vorðin grøn

5.845 framsýnarar sýna fram á heimsins størstu KT-stevnu í Hannover í Týsklandi. 33 fótbóltsvøllir. So stór er heimsins størsta KT-stevna í Hannover. Hvørt ár valfarta umleið 400.000 fólk til stevnuna fyri at kanna hvønn veg KT-vinnan fer at flyta seg tey komandi árini. Og tú hevur ikki gingið leingi á stevnuni, fyrr enn tú ásannar, at umhvørvið, grønur rakstur innan KT, fer at seta sín dám í framtíðini. Og tað eru tað allar góðar orsøkir fyri. KT vinnan hevur sambært kanningastovninum Gartner ábyrgdina av 2 prosentum av heimsins $CO_2$ útláti. T.d. er $CO_2$ útlátið hjá øllum luttakarum á hesi KT-stevnuni, við teldum eins stórt sum hjá 17.000 bilum – um árið. Hóast nógv verður tosað um grøna KT, so væntar felagsskapurin Climate Savers Initiative, at 90% av øllum teldum, ið verða seldar í ár, ikki hava nakað slag av orkusparing.

*www.business-line.fo*



# Satsið 16 miljónir og skapið nýggjar vinnumøguleikar



**Boðskapurin hjá Annfinni V. Hansen, formanni í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip, var greiður á Shipping Føroyum 2008. Hann mælti myndugleikunum til at satsa tær 16 miljónir krónurnar, sum landskassin fær í skatti um FAS-skipanina**



*- Gera vit einki fyri at skapa nýggjar vinnuvegir og fáa tann sera einstáttaða føroyska búskapin víðkaðan, kunnu vit rokna við, at eisini tær 16 miljónir krónurnar, sum landskassin fær í beinleiðis skatti frá FAS, verða mistar, segði Annfinn V. Hansen á Shipping Føroyar 2008*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

SHIPPING 08
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Annfinn V. Hansen segði, at hansara fyritreytir sum formaður í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip ikki liggja í tí, at hann beinleiðis er shippingmaður, sum hann tók til, men advokatur. Eisini umboðar hann onnur skip, sum koma higar til lands.

Hann segði, at Reiðarafelagið fyri Farmaskip (RFF) upprunaliga var eitt arbeiðsgevarafelag, og í dag umboðar felagið flestu skip í hesi vinnu.

- Tíverri eru skipini ikki so mong í tali, men tey geva nógv, bæði beinleiðis og til okkum, sum ganga uppi á landi, eitt nú til advokatar, grannskoðarar, skrivstovufólk, tryggingarfeløg og onnur.

### Hvørki fuglur...

Formaðurin helt, at shipping-vinnan saktans kann gerast eitt bein aftrat fyri samfelagið – ikki bara í beinleiðis og óbeinleiðis inntøkum, men eisini í at menna altjóða førleikar í øðrum vinnum.

- Soleiðis, sum FAS-skipanin er í dag, er hon hvørki fuglur ella fiskur. Tað er ikki serliga áhugavert at koma upp í skipanina, og nú umhugsa fleiri, sum eru partur av henni, at fara úr føroysku skrásetingini aftur. Vit hava tí gjørt av aktivt at arbeiða fyri at betra skipanina.

Annfinn V. Hansen vísti á kanningina, sum er gjørd um FAS og segði, at frágreiðingin partvís tekur saman um tað álit, sum varð gjørt í januar ár 2006.

- FAS-skipanin gevur í dag 16 miljónir krónur beinleiðis til landskassan, og kanningin vísir eisini, at FAS rindar umleið 150 miljónir krónur í beinleiðis lønum og tænastum. Ein varislig meting sigur, at ávirkanin á bruttutjóðarúrtøkuna (BTÚ) er einar 225 miljónir krónur, og tað er soleiðis eini 2% av BTÚ.

Hann segði, at talan í hesum føri erum valutainntøkur, útflutning og tænastur, sum ikki taka burtur úr okkara rávørum, men kunnu síggjast sum ein beinleiðis innspræning av virðum til samfelagið.

- Tey, sum eru í vinnuni, eru eisini í teimum hægri lønarflokkunum, so virðisøkingin roknað yvir arbeiðstíma fyri arbeiðstíma er so nógv størri enn í nógvum av teimum traditionellu vinnunum.

### Ikki kappingarfør

Formaðurin segði, at tann útmelding, sum felagið fær frá sínum limum, er, at FAS-skipanin er ov dýr og tí ikki kappingarfør. Tí kann væntast, at vit fara at síggja eina útflagging, fyrst og fremst millum tey skip, sum einki beinleiðis eigaratilknýti hava í Føroyum.

- Væntast kann heldur ikki, at teir, sum gera íløgur í shipping-vinnu, fara at velja at sigla undir føroyskum flaggi undir verandi skipan.

Soleiðis, sum FAS virkar í dag, verður eitt reiðarí, ið satsar upp á føroyska manning, beinleiðis diskriminerað í mun til útlendsk skrásettu.

Annfinn segði, at skal manningin verða føroyskt, skal skipið ikki verða skrásett í FAS. Einasti fyrimunur við FAS-skráseting, er, at hetta er lætt fyri tey, sum virka her, tí skipanin er kend. Verður satsað upp á útlendingar, er skipanin eisini dýrari enn DIS og NIS, og soleiðis er eingin grundgeving fyri at velja FAS.

- Fólk, sum sigla í shipping-vinnu, hava lætt við at flyta, tí hesi arbeiða globalt, sum hann tók til. Høvdu rammurnar hinvegin verið nóg góðar, høvdu fólk skjótt funnið út av hesum. Tað er skjótt at missa álitið á eina skipan sum FAS, men enn er tað ikki mist.

### Hevur skund

Hann vísti á, at einasta grundgeving fyri at velja FAS hevur verið, um skipini partvís sigla innanoyggja í Danmark ella Noregi, men kostnaðurin er tó rættiliga stórur fyri henda fyrimun.

- Fyri eigarar úti í heimi er eingin grundgeving fyri at velja FAS, legði hann dent á.

Formaðurin í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip setti eisini spurningin, hvat skal til fyri at velja FAS skal fáast burtur úr okkara føroysku altjóða skipaskráseting.

- Uppgávan hjá tí almenna er í hesum føri at skapa karmarnar, og eyðvitað er, at tað hevur stóran skund at broyta skipanina. Skipanin má broytast beinanvegin.